

*Todi Jónsson telist millum teir leikarar, sum stórar vónir eru til, tá føroyska landsliðið skal royna seg móti finnum mánadagin*

# Útisetarnir verða álitið

*Men Jógvan Martin Olsen heldur, at fleiri av landsliðsspælarunum heima á landi eru betri fyri nú, enn teir plaga at vera so tíðliga á árinum*

Tað kennist heilt óveruligt í føroyska vetrinum, sum nústaðni fer at koma í hæddina, men kortini er tað ein veruleiki. Nú mánadagin skal fótbóltslandsliðið fyri fyrstu ferð í ár í eldin, og tað er vorðið sum uppgáva so tíðliga á árinum.

Føroyar skulu spæla altjóða skrásettan landsdyst ímóti Finnlandi í La Manga í Spania, og tá havt verður í huga, at tað nústaðni av álvara verður farið undir fyrireikingarnar til fótbóltsárið heima á landi, so er tað einki at undrast á, at óttin fyri ikki serliga sannførandi avriki og harvið vánaligum úrsliti lúrir:

Heimligu landsliðsspælararnir hava tvey tey seinastu vikuskiftini verið á Svangaskarði og vant. Allan Simonsen var saman við teimum fyrru ferðina, og síðsta vikuskiftið tók Jógvan Martin Olsen, hjálparvenjarin hjá Allani Simonsen, einsamallur sær av venjingini.

Jógvan Martin hevur síðsta mansaldurin verið við í fremstu røð í fótbólti, og tí átti hann at verið væl fyri at mett um, hvussu landsliðsspælararnir eru fyri, nú teir skulu í eldin:

– Tað hevði verið skeivt at sagt, at landsliðsspælararnir eru í toppvenjing, men teir eru ikki verri fyri, enn teir plaga at vera hesa ársins tíðina. Burtursæð frá Jens Kristiani Hansen er eingin í dystarvenjing, og hjá fleiri, sum spæla í Føroyum, fara feløgini akkurát nú undir venjingina. Landsliðsspælararnir høvdu fingið at vita, at teir skuldu renna, og tað hava teir gjørt um enn ikki allir í sama mun. Í summum feløgum hevur verið eitt sindur av felagsvenjing í mest sum allan vetur. Í øðrum feløgum hava teir einki vant, og so eru tað teir, sum hava fingist við annan ítrótt, t.d. eru tað onkrir, sum hava spælt hondbólt.

### Útisetarnir álitið

Jógvan Martin Olsen heldur, at tað kemur sera væl við, at fleiri av landsliðsspælarunum hava tað til fulltíðar yrki at spæla fótbólt uttanlands:

– Burtursæð frá Jákupi Mikkelsen og Hans Fróða Hansen eru allir útisetarnir við í Spania. Fótbóltsárið hjá teimum endaði seinni, enn tað heima hjá okkum, og teir hava longu vant í fleiri vikur. Fótbóltur er liðítróttur burturav, men í hesum førinum er tað ikki undarligt, at vit serliga rokna við útisetunum.

Teir útisetarnir, sum hjálparvenjarin sipar til, eru teir, sum spæla í Skotlandi, Danmark og Noregi. Teir eru Jens Martin Knudsen, Jens Kristian Hansen, Kurt Mørkøre, Julian Johnsson, Óli Johannesen og Todi Jónsson.

Sámal Joensen, Allan Mørkøre og Uni Arge teljast eisini millum teirra, sum fáa løn fyri at spæla fótbólt uttanfyri landoddarnar, men hesir tríggir skulu spæla í Íslandi, og teir fara ikki yvir til Íslands fyrrenn eina ferð í mars.

Tað er kortini merkisvert, at ikki færri enn níggju av spælarunum eru skrásettir at hoyra til útlendsk feløg. Higartil er tað ongantíð komið fyri, at størri helmingurin av spælarunum í landsliðshópinum hevur umboðað útlendsk feløg, men tann landsdysturin er ikki langt burtur, tá hetta fyri fyrstu ferð verður veruleiki.

### Nógvar útskiftingar

Tað er ikki bara í Føroyum, at fótbóltsárið er ungt. Í ongum av norðurlendsku londunum verður spælt í landskappingini hesa tíðina av árinum. Nógv teir flestu spælararnir, sum eru í La Manga í Spania, koma úr feløgum, sum hoyra heima í umboðandi londunum. Tað vil við øðrum orðum siga, at eingir spælarar eru í dystarvenjing, og tí er tað væl skiljandi, at tað er avrátt, at tað í hvørjum dysti verður loyvt at skifta fýra útispælarar út, umframt at tað er loyvt at skifta málverja.

Allan Simonsen plagar ikki at vera serliga grammur at skifta út, men hesa ferð eru umstøðurnar soleiðis, at tað er rættuliga sannlíkt, at nógvar og kanska allar tær loyvdu útskiftingarnar verða framdar.

### Tríggjar venjingar

Landsliðið fór úr Vágum fyrrapartin í gjár. Inntil í morgun skuldu teir halda til á Brøndby Park Hotel í Brøndby, og eftir ætlan skuldu teir lenda í Spania á middegi í dag. Spælararnir, sum búgva í Føroyum, Danmark og Noregi, skuldu eftir ætlan ferðast saman til Spania. Jens Kristian Hansen og Jens Martin Knudsen skuldu koma til Spania beinleiðis úr Skotlandi í kvøld ella í morgin.

Fyrsta venjingin er á skránni seinnapartin í dag. Í morgin verður vant tvær ferðir, og so er dysturin ímóti Finnlandi mánadagin.

Tað er vónleyst at siga nakað um, hvussu venjarin fer at seta liðið mánadagin. Men tað er upplagt, at ímillum teir fyrstu ellivu vera Jens Martin Knudsen, Óli Johannesen, Jens Kristian Hansen, Kurt Mørkøre, Julian Johnsson og Todi Jónsson. Í einum sovornum føri sum hesum hava royndirnar nógv at siga, og tí er tað givið, at Allan Mørkøre, Henning Jarnskor og Sámal Joensen eisini fara at vera á vøllinum frá fyrsta bríksli. Fríggjadagin í komandi viku er dysturin ímóti Íslandi á skránni. Tað man vera rættuliga sannlíkt, at allir ella næstan allir átjan spælararnir hava verið í dysti, tá stríðið ímóti íslendingum verður av. jh

# Toppdystur í Havn sunnudagin

*Flogbóltur: Vinnur Fleyr á Fram sunnudagin, so er spenningurin í kappingini hjá monnum farin, tí tá eru teir so langt frammanfyri, at eingin tekur teir. Og í kvinnudeildini er lítið mætari*

Sveinur Tróndarson

Sum vit nevndu í blaðnum mikudagin, so háttaðu úrslitini í flogbóltinum seinasta vikuskiftið seg soleiðis, at spenningurin í teimum báðum deildunum er um at fjara út.

Kvinnurnar hjá Mjølni og menninir hjá Fleyr eru so langt frammanfyri hini liðini, at tað bara er spurningur um tíð, til leikararnir á nevndu liðum kunnu staðfesta, at tey eru meistarar.

### TB skal vinna

Í kvinnudeildini er tað so, at Mjølnir ikki spælir hetta vikuskiftið, men kortini er tað eitt slag av toppdysti, sum verður á Giljanesi leygardagin. Dráttur og gestirnir úr TB eru ávikavist nummar tvey og trý, og skulu vágagentur gera sær nakrar vónir at enda á øðrum plássi íár, so skal dysturin móti TB bara vinnast.

Støðan hjá TB er nett tann sama. Tær eru í veruleikanum einasta liðið, sum teoretisk kann hótta Mjølnir og tí er tað eitt heilt einfalt krav at tær vinna dystin móti Drátti.

Hvussu leikur so fer, er ikki gott at vita og enn verri at spáa um. Dráttur vann seinasta vikuskiftið á Fleyr, meðan tað eftirhondini er langt síðani at TB yvirhøvur spældi - av ymsum ávum sjálvsagt. Dráttur er ikki so illa fyri í ár, og tað tykist, sum tær hava fingið spælið meira støðugt, nú kappingarárið fer at halla. TB fekk hinvegin ein rimmar smeit við byrjanina av árinum, tá nógvir leikarar fóru av oynni, og tað er nakað, sum tekur tí at javna út. Hetta hevur ikki eydnast teimum enn, men fyri tað liggja tær og kappast um annað pláss.

Hin dysturin í deildini er botnuppgerðin millum Fleyr og ÍF, sum verður spældur í Gundadalshøllini.

Her er støðan tann, at tað er bara eittans stig millum liðini undan dystarbyrjan og verður endin tann, at ÍF vinnur, so koma tær úr botninum fyri fyrstu ferð í ár. Samstundis fer Fleyr heilt í botnin, og tað mann vera fyrstu ferð í nógv, nógv ár. Sum úrslitini hjá liðunum hava verið í seinastuni kann dysturin fara hvønn veg tað skal vera.

### Toppdystur í Havn

Tá kvinnurnar hjá Fleyr og ÍF hava gjørt burtur av sær sunnudagin, sleppa menninir hjá Fleyr og Fram, framat. Her er talan um reinan toppdyst, sum í roynd og veru avgerð meistaraheitið. Vinnur Fram er enn ein vón um, at eitt sindur av spenningi verður varðveittur, men vinnur Fleyr, so er spenningurin fokin.

Í løtuni eru teir so langt á odda, at tað í grundini bert er ein teoretiskur møguleiki, at teir ikki gerast meistarar í ár, men hann er har.

Meta vit eftir spælinum higartil í ár, so er einki at ivast í, at Fleyr er favorittur til sigurin, tí teir hava víst sera gott og varierað spæl. Kortini hava teir rist á hondum seinastu báðar dystirnar, sum teir tó hava vunnið tá teir hava sett ferðina upp. Tá var talan um lið, sum liggja longri niðri í stigatalvuni, og nú teir hitta Fram er ikki óhugsandi, at teir seta fulla ferð á beinanvegin.

Um Fram er tað at siga, at teir munnu vera tað liðið, um nakað, sum skal steðga Fleyr. Um jóltíðir var væntandi, at tað skuldi gerast Mjølnir, men klaksvíkingar taptu innanhýsis dystin móti Fram í Havn, og tað setti yngra havnafelagi í avbjóðarasessin.

Hóast fleiri góðir leikarar eru á Fram liðnum, so er eftir okkara meting, ikki sannlíkt, at Fram tekur stig frá Fleyr.

Hin dysturin verður í Sørvági, har SÍ fær vitjan av ÍF. Eisini her er talan um botnuppgerð, og bert tvey stig eru millum liðini.

Sørvingar hava eftir eitt gott tíðarskeið fyrr í vetur, ikki havt somu eydnuna við sær, og tað merkir í veruleikanum, at teir - um teir tapa - kunnu enda heilt í botninum. Hetta er úrslitið av kappingarreglunum, sum siga, at tá kappingin er hálvrunnin, vera stigini býtt í helvt. SÍ hevði seks stig - fyri tríggjar vunnar dystir - meðan ÍF hevði 2 stig fyri ein vunnan dyst. Tí kann tað kanska tykjast órímuligt, at fuglfirðingar nú við einum sigri kunnu fara framum. Løgin skipan? Tað er tað møguliga, men tað er hon, sum er vald framum aðrar.







FØROYATELE

FØROYA TELE-CUP

Innandurakapping í fótbólti fyri menn, 16 ár og eldri verður í ítróttarhøllini í Runavík vikuskifti 5. til 6. februar

Reglur o.a.

- Spælt verður við stórum málum (smápiltamálum).
- Á hvørjum liði eru 5 leikarar, 4 útileikarar og 1 málmaður.
- Loyvt er at hava 1 eykaleikara.
- Luttakarakostnaður: kr. 300,- fyri hvørt liði.
- Øll liðini skulu hava rættulig fótbóltsnøvn, sum t.d. B68, HB; Liverpool, Pharma osfr.

Heiðursmerkir verður latin nr. 1, 2 og 3.
Tilmelding á tel. 448274/448068
frá kl. 20.00 til 21.00.
Seinasta freist er 3. februar.

Tofta Ítróttarfelag

Sosialurin - 311820



ADC-Heilsølan
Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893
ARBEIÐSHANDSKAR
Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi
LANDSINS STØRSTA ÚRVAL
frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar
ADC
BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA



Rimmar útsøla
í Telebúðunum
upp til
75%
í avsláttri
av fastnettelefonum, telefaksum, telefonsvararum og skannarum

...og sjálvandi frá dygdarmerkjum sum t.d. Ascom, Dancall, Dana, BeoCom, Kirk, Doro og Samsung

TELEBÚÐIN
Tórshavn 31 70 10 • Tvøroyri 37 10 00 • Søldarfjørður 44 10 00
Norðurstreymoy 42 10 00 • Klaksvík 45 74 88 • Sandur 36 10 00 • Miðvágur 33 20 00

Yamaha Waveraider vatnskutari til sølu



1100 cc motor, QSTS system 110 HK top fart 120 km sær sera gott út. Hevur bert siglt í 60 tímar.

Ikki fyri persónar við veikum hjarta. Bert til keyparar, ið meina tað í álvara.

Tlf. 37 21 10 • Mobil 21 52 10

Reyði krossur Føroya

Sorgarlinjan hjá Reyða Krossi Føroya svarar allar dagar frá kl. 17[00] til 23[00]

212380

Lýsið í sosialinum

FLOGFRAKT/ SJÓFRAKT



SAFARI TRANSPORT
GREIÐA ALLAN FLUTNING & ØLL PAPPÍR
Tlf. 31 22 22